# Dreymurin gjørdist veruleiki

**Álvarsamt, yndisligt, stuttligt, syrgiligt, ferðmikið, stórfingið… Listin er endaleysur við orðum, sum kunnu lýsa sangleikin »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið«. Tó kenna vit, at orð eru ov fátøk og avmarkað at fevna um upplivingina, vit fingu í einum stúgvandi fullum Norðurlandahúsi undir frumframførslu týskvøldið, tá næmingar úr Hoydølum við sangleikinum tóku áskoðarar og áhoyrarar við á eina litfagra og fjølbroytta ferð aftur í bíbliusøguna**



*Sangleikurin "Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið" verður framførdur av 80 ungfólkum, sum eru limir í felagnum Tónaungdómar og einamest koma úr Studentaskúlanum í Hoydølum*



*Ferðmiklu og støðugt aktivu dansararnir góvu leikinum eitt tempo, sum veruliga kravdi konsentratión frá hyggjarum og lurtarum*



*Brøður Jósefs stóðu í størstan mun fyri stuttligu pørtunum av leikinum, har teir í modernaðum klæðum knýttu saman nútíð og tátíð*



*Talan var um eina dreymakenda og stórfingna frumframførslu í Norðurlandahúsinum týskvøldið, tá 80 ungdómar einamest úr Hoydølum framførdu »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið«*

UMMÆLI
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Tað er ein løgin og sera torfør uppgáva at skriva um sangleikin »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið«. Fyrst og fremst tí nakrar hendingar her í lívinum einfalt skulu upplivast, tí orð eru nevniliga ikki ment at lýsa og fevna um stórbæru frumframførsluna í Norðurlandahúsinum týskvøldið. Fyri tað næsta vóru áskoðarar og áhoyrarar vitni til eina so ferðmikla framførslu við so nógvum og fjølbroyttum listagreinum samstundis í fokus, at hyggjarar og lurtarar (og ikki minst ummælarar) kenna seg hjálparleysar at lýsa sangleikin og hvørja einstaka umboðandi listagrein til fulnar. Tó sita vit eftir við eini heildarupplivjing, og tað er hana, vit eru noydd at krøkja okkum í.

## Sjálvtøkuborð við alskyns tónleiki

Søgugongdin í leikinum verður úr enda í annan frásøgd við sangi og tónleiki, og frásøgugenturnar Erla Bech Jensen og Ann Chanett Danielsen rúnarbundu frá byrjan við yndisligari rødd. Við vakra og týðiliga frásøgusanginum vóru tær ein berandi megi gjøgnum sangleikin, og lagaðu tær støðugt rødd og kropsmál eftir huglagnum í leikinum. Sangframførslur teirra vóru alt frá friðarligum og yndisligum balladum til lívligari rokk og humoristiskum vísum.

Tónleikurin í sangleikinum kann samanberast við eitt stórt og fjølbroytt sjálvtøkuborð, tí so ymiskar sjangrur vóru umboðarar í frálíka musical tónleikinum. Friðarligar og sorgblíðar balladur, rokktónleikur, franskar fólkavísur og stórslignar big band framførslur í klassiska Eirikur Skála stílinum eru at hoyra kryddaðar við funk kendum stíli og kalypso, og ofta verður lurtarin tikin á bóli, tá tónleikurin tekur eina brádliga vend samsvarandi søgugongdini. Eitt av mongu dømunum um hetta er, tá Jósef verður seldur til Egyptalands. Við óhugnaligum tónleiki syngur Ann Chanett um lagnu Jósefs sum trælur, síðani verður skift yvir í skemtingarsamt vísulag, tá kona Potifars roynir at tekkjast Jósefi, og so fer tónleikurin yvir aftur í vreiðikendan, dramatiskan og horrorkendan stíl, tá Jósef verður blakaður í fangahús av harra sínum. Í djúpari kreppu í einsemi í fangahúsi fær leikurin melankolsku kenslurnar upp á kók, tá Jósef saman við barna- og rútmiska kórinum syngur um vónleysu støðu sína, sum tó er eyðkend av vón og trúgv á lyftið um, at »okkum er lovað eitt undurfult land«. Undan hesum er sorgblídni eisini í hásæti, tá Erla saman við blásarunum og kórunum staðfestir fyri brøðrunum, at »tit seldu hann sum træl«. Áðrenn steðgin tekur leikurin aftur eina vend við sanginum »Koyr á Jósef«, har fjøldin verður fóðrað við rokki, blásarum og einum palli á tremur við leikarum, sangarum og dansarum. Vit gleddu okkum longu til, at seinna hálva skuldi fara í gongd…

## Elvis the King

Av meiri skemtingarsomu løtunum er eitt hæddarpunkt, tá Jósef skal týða dreymar kongsins. Heilt óvæntað tekur leikurin eina vend, tá Farao kongur blakar krúnu sína og trínur fram sum Elvis Presley, meðan hann í besta rock´n roll stíli við Elvis frisuru greiðir Jósefi frá dreymum sínum. Í samanrenningini av Elvis og Farao stendur René Bischoff fyri einum stuttligum og sera óvæntaðum íkasti, sum fekk láturin at runga í salinum. Tí er tað spell, at teksturin hjá Farao í júst hesum broti hoyrdist ov illa. Tá øll søgugongd verður fortald gjøgnum sang, er tað ein fortreyt, at sangtekstirnir hoyrast, og tískil var hetta eitt minus. Somuleiðis hevði røddin hjá Erlu Bech Jensen lyndi til at hvørva í góða rokktónleikinum í sanginum »Hvør er tjóvurin«, tá silvursteypið hjá Jósefi varð funnið í sekki Benjamins. Júst tað at gera tekstin skilligan er ein høvuðsavbjóðing í sangleikum, og oftast varð henda uppgávan loyst til fulnar, men tað var tíverri í løtum, at torført var at hoyra sangtekstin. Undantikið hesum at sangtekstirnir onkuntíð fánaðu, tyktist ljóðið sum heild vera sera gott. Ein glasspláta stóð fyri rokkbólkin og tók broddin av ljóðinum, og somuleiðis var flotta ljósið eisini eitt avgjørt pluss.

Tá Jósef er fyristøðumaður kongsins í Egyptalandi, og kreppa herjar heima hjá faðiri og brøðrum hansara, uppliva áhoyrarar og áskoðarar eisini eitt komiskt meistaraverk. Í eini fólkavísu við harmonikutónleiki syngur Høgni Reistrup (Simeon) á føroyskum við franskari dialekt um neyðina í Kánanslandi. Høgni tykist her vera tann føddi komikarin, og er hetta avgjørt av stuttligastu brotunum. Brøður Jósefs eru sum heild grundarlagið undir stuttligaru síðuni av sangleikinum, og av teimum 11 brøðrunum stóðu Ragnar Djurhuus (Ruben) og Rani A. Skaalum (Juda) saman við Høgna Reistrup fyri stuttligum og góðum soloframførslum.



*Jóannes Lamhauge hevur krevjandi og fjølbroytta høvuðsleiklutin sum Jósef, og megnar hann avbera væl at framføra bæði í sangi og leiki. Her er hann júst blakaður í fangahús av Potifar*

## Tempo

Framførslan er støðugt eyðkend av dynamikki og turbulensi. Fleiri leikarar og ikki minst dansarar reikandi kvikliga á pallinum skapa eitt tempo, sum gevur leikinum spenning, men sum samstundis krevur, at hyggjarar og lurtarar konsentrera seg 100%. Tað verður lagt hart fyri, tí longu í triðja sanginum um »Jákup og tey« er framførslan brádliga samansett av barnakóri, brøðrum Jósefs, frásøgugentunum og dansarum, og borið av lívliga tónleikinum frá blásarum, trummum, bassi, elguitara og keyboardi er hetta eitt stórfingið show, sum heldur fram í næsta sanginum »Dreymakotið«. Hvør lítil partur í framførsluni harmonerar, og gongur alt tískil upp í eina hægri eind.

Viðvíkjandi búnum er talan um eina blandaða samanseting av gomlum og nýggjum. Yngri bróður Jósefs, Benjamin, hevur t.d. ein »streetwear« tannáringastíl við skateboardi undir arminum, meðan fleiri ymsar typur eru at finna millum hinar brøðurnar: Simeon líkist einum skúlanørdi, Gád er í undirtroyggju og mascara, meðan Ruben kundi verið tikin beinleiðis úr einum western filmi. Í kongshúsi Faraos í Egyptalandi er talan øvugt um ein klædnastíl úr fornari tíð við hvítum kyrtlum, og tískil eru fleiri ymisk tíðarskeið umboða í klædnasniðinum líka frá døgum Jósefs til dagin í dag. Fjølbroytti mótin við nýggjum og gomlum letur eina gamla søgu í nýggjan, modernaðan ham, og knýtir hann tvey grundleggjandi ymisk tíðarskeið og umstøður saman. Dreymakot Jósefs er eitt føroysk kot, sum í undirpartinum er myndað av umleið 60 slipsum í alskyns litum! Eitt kreativt og øðrvísi hugskot frá klædnadesignarunum.

Eitt tað fyrsta, vit eisini leggja til merkis, er pallsmíðið. Talan er um eitt satt byggiverk við stórum og breiðum trappum, og er tað skilligt, at nógv stríð liggur handan pallmynd og pallsmíð.



*Ann Chanett Danielsen og Erla Bech Jensen vóru frásøgugenturnar í leikinum, og varð øll søgugongd frásøgd í sangi og tónleiki. Tær báðar vóru millum berandi kreftirnar í Norðurlandahúsinum týskvøldið*

## Ein fjølbroyttur Jósef

Jóannes Lamhauge hevur høvuðsleiklutin sum Jósef, og torført er at ímynda sær, at nakar hevði verið betri egnaður til henda krevjandi leiklut. Leiklistarliga krevur hetta sera nógv, tí Jósef er í so mongum ymiskum umstøðum. Frá at vera ein mildur og droymandi unglingi í Kánanslandi, sum sólar sær í favoritismu frá pápanum, gerst hann offur fyri hatri og øvundsjúku. Fyrst verður hann seldur sum trælur, síðani gerst hann fyristøðumaður Potifars, so fangi og dreymatýðari, áðrenn hann til seinast kemur til valdið og gerst høgra hond hjá sjálvum Farao kongi. Leiklutur Jósefs spennir líka frá djúpastu kreppu og vónloysi til vald og æru, og Jóannes Lamhauge megnar sera væl fjøltáttaðu leiklutir Jósefs. Umframt at leika hevur Jóannes Lamhauge fleiri solosangir; hann megnar sostatt avbera væl fleiri listarligar avbjóðingar samstundis, og vónandi og væntandi verða sangirnir í leikinum fólkaogn í nærmastu framtíð. Sangurin »Gev mær onkran dreym«, sum bæði verður framførdur við byrjan og enda, er eitt avgjørt boð uppá eina nýggja føroyska landaplágu.

## Jósef fullførdi dreymarnar

Sum heild er talan um eitt satt meistaraverk, sum manar fram so ymsar og sterkar kenslur í áhoyrarum og hyggjarum, samstundis sum ymsu listagreinirnar gjørdu Norðurlandahúsið til eitt hav av mentanarligum tilfeingi á hægsta stigi við mest professionellu karmum, vit í Føroyum kunnu ynskja okkum. Torført er at skilja, at talan er um amatørar, sum framføra, og at sangleikurin í veruleikanum er ein skúlaverkætlan við Rytmiska kórinum í Hødoylum sum grundstammu, men sum síðani hevur fingið samstarv í lag við aðrar bólkar uttanfyri skúlans gátt.

Stóra finalan móti endanum er kanska absolutta klimaksið í leikinum, har Jósef vísir náði og fyrigevur brøðrum sínum, áðrenn faðirin Jákup aftur hittir eygnastein sín, sum sambært skriftunum tá hevði verið 22 ár í útlegd, harav fleiri ár í fongsli. Í eini kombinatión av rokki og blásarum við títtum fimleikaserium og nærum øllum leikarum á palli endar eitt dreymakent kvøld við lógvabrestum frá fjøldini.

Gjøgnum líðing og neyð stríddi Jósef seg til heiður og æru. Við íblástri frá dreymunum varð vónin hildin á lívi, sjálvt tá hann varð vrakaður, seldur og settur í fangahús. Við eygunum vendum samstundis móti idealunum og veruleikanum vann hann á vónloysi og mótgongd. Jú, dreymurin gjørdist av sonnum veruleiki, bæði fyri Jósefi og fyri okkum mongu, sum týskøldið høvdu leitað okkum niðan í Norðurlandahúsið.



*Barnaróddirnar frá Føroya Musikkskúla stjórnaðar av Sigrid Sivertsen góvu leikinum eina eyka dýpd, serliga undir sorgblídnu og kenslubornu løtunum*

## Fakta

Leiðararnir í Rútmiska kórinum í Hoydølum eru stigtakarar til leikin, meðan Tórshavnar Musikk-, Kvøld- og Ungdómsskúli eisini luttaka

Dánial Hoydal og Anna Kristin Bæk hava týtt leikin til føroyskt

Millum berandi kreftirnar handan leikin eru: Herleif Hammer (framleiðslustjóri), Hans Olivur Joensen (stigtakari), Jákup Veyhe (leikstjóri), Jóna Thomsen og Elsa Maria Bærentsen (koreografar), Zacharias Sørensen og Sigrid Sivertsen (kórleiðarar), Jóannes Gaard (pallsmíð), Atli Petersen og Eirikur Skála (orkesturleiðarar)

Sangleikurin varð skrivaður av Andrew Lloyd Webber og Tim Rice í 1967, og setti hann í 1991 met, tá 200 milliónir atgongumerki vórðu seld til leikin í London. Síðani tá eru atgongumerki til Jósef leikin seld fyri 2,2 milliardir krónur